# JARGAÐUR, NA 20 KRÓNU

hóming av støðuni: Hví fara til frisør, tá man kann klippa fruntin sjálv, ella bara lata frisørin »snøgga« sær hárið hvørja ferð, fyri at sleppa bíligari? Hví keyp nýtt, tá til ber at keypa klæðir í Blákross – ikki fyri stuttleika, men av neyð? Ella bara fara inn á dansistøð, har inngongdin er ókeypis, og so at nippa til somu sodavatnina alla náttina.. og ongantíð at kunna luttaka í einum shoppingtúri, og so slett ikki, um leiðin fer av landinum. Ella altíð at noyðast at keypa tað bíligasta til heimið, sum tí ongan stíl hevur.. ja, dømini eru mong.

– Eg og sonurin hava ongantíð ferðast saman. Tað kundi eg hugsað mær at roynt, tí vit hava øll gott av at koma burtur frá tí heila viðhvørt, sigur Beinta, meðan hon suffar:

– So vit verða bara verandi her í Føroyum.

## Sálarliga tyngjandi

Sálarliga hevur tað eisini avleiðingar, at liva á so bíliga í Føroyum, her fólk vanliga látast at hava ráð til alt.

– Tað kennist slítandi og strævið og órættvíst og irriterandi altíð at vera í trongum skóm fíggjarliga. Og tað er eyðmýkjandi ikki at kunna klára seg sjálva sum 36 ára gomul, sigur Inger, sum eisini er farin at óttast støðuna á arbeiðsmarknaðinum, nú nógvar sparingar eru fráboðaðar innan skúlaverkið.

Av tí, at hon ikki er í føstum starvi, ber hon ótta fyri at missa starvið sum lærari. Hetta er eisini ein tyngjandi oman á fíggjarligu trongstøðuna.

– Tey, sum hava tvær inntøkur siga ofta: Vit hava heldur ongar pengar. Men hvat skal eg brúka tað til, tí tey hava ofta dupult so nógv sum eg, sigur hon eitt sindur firtin.

Og tær tosa um skommina og skuldarkenslurnar mótvegis børnunum, at tað ongantíð eru pengar til nakað, og at alt tað, sum børnini fáa av leikum, klæðum og stuttligum upplivingum ofta kemur frá øðrum.

– Tað er so sárt at tosa um, tí tað ringasta hjá einum foreldri er, ikki at megna at syrgja fyri barninum. Men tað kann eg ikki altíð, og tí verið eg so kedd innií, sigur Beinta.

Og tær nevna sálarliga trýstið av at vera einsamøll við allari ábyrgdini.

– Tá man er tvey, er man eisini saman um alt tað trupla, og kann tosa saman um tað. Men tosar tú við onnur enn tey nærmastu, ert tú bara eitt grenj, sigur Beinta.

## Niðrandi móttøka

Tær báðar kvinnurnar hava verið í sambandi við myndugleikarnar, tá tær brádliga stóðu einsamallar við forsyrgjaraskyldu.

Men tær hava ikki rætt til nakra hjálp, hvørki til bústað, ferðing ella barnaansing, tí tær forvinna fulla løn sjálvar.

– Tá eg varð skild, stóð eg á berum. Tá kravdi Almannastovan, at skuldi eg gera mær nakra vón um hjálp, mátti eg ikki hava bil, men taka bussin. Men so hevði eg ikki sloppið til arbeiðis, sigur Beinta. Hetta var ikki minst galdandi fyri Inger, sum búði í Fuglafirði og arbeiddi á Toftum.

– Busssambandið í Eysturoynni er soleiðis, at tað passar ikki millum bygdirnar, til dømis at avlevera barn á dagstovni, at fara til arbeiðis, at keypa inn, aftur og fram hvønn dag, sigur Inger.

Men tað er serliga tosingarlagið hjá starvsfólkunum í almannaverkinum, sum tær báðar fýlast á. Hesin niðrandi tónin fekk tær eisini at geva upp á hálvari leið, tí kenslan av at koma undir umsiting, ella at verða ómynduggjørdar var so lemjandi.

– Eg varð viðfarin sum ein brotsmaður. Um eg skuldi gera mær nakra vón um hjálp, kravdi sosialráðgevin millum annað at síggja allar kvittanir fyri mat fyri ein heilan mánað. Gudvitið, hvat hevði hent, um tað stóð ein pakki av Haribo á? hugleiðir Beinta, sum tó ikki kundi fáa hjálp, tí hon hevur bil!

– Tað kendist sum, at tey eru sett í starv fyri at geva okkum, sum eru komin í eina trongstøðu, sum minst. Tey eru í øllum førum ikki til fyri brúkaran og áttu at farið á samskiftisskeið, sigur hon.

Inger hevði somu uppliving, tá hon stóð á berum og flutti inn í eitt 9 fermetrar stórt kamar heima hjá foreldrunum.

– Tá vóru boðini, at um eg fann okkum eina íbúð, so setti eg meg sjálva í eina verri fíggjarliga støðu, og tí kundu tey ikki hjálpa. So tey mæltu mær í roynd og veru til at vera búgvandi heima hjá foreldrunum við barninum, sigur Inger, sum kortini valdi at flyta í eina íbúð, og tískil ikki kundi fáa hjálp.

Hendan støða hevur gjørt, at Beinta og Inger í dag eru fullkomiliga bundnar av hjálp frá familju og vinfólki.

– Vóru foreldrini ikki har, hevði eg búð í einum tjaldi, fortelur Inger.

Báðar tvær leggja dent á, at børnini mangla onki sum so, tí ommur og abbar og onnur forkela tey viðhvørt. Men sjálvar hava tær ikki ráð til nakað útyvir mat.

## Freistandi at flyta

At tær ikki eru farnar av landinum fyri langari tíð síðani, kemst helst av, at tær hava góð netverk og samstarva væl við fyrrverandi menninar, sum hava børnini aðruhvørja viku. Tey hava felags foreldramyndugleika, og tað riggar væl.

Higartil hava tær havt eyka størv um kvøldarnar, tá børnini eru hjá pápunum. Men kreppan tók arbeiðsplássini, so nú er onki eyka starv at finna á Skálafjørðinum, har tær liva og virka.

– Eg havi heilt sikkurt langt síðani verið farin, um tað ikki var tí, at hetta er heimstaðurin hjá dóttrini, og her hevur hon øll síni kæru, umframt pápan, sigur Inger. Beinta hevur búð niðri fyrr, men tað er ikki nakað hon saknar.

– Men, tá tað kemur til at fíggjarliga, so er tað sjálvandi freistandi at fara, tí man hoyrir um stakar uppihaldarar, sum fáa nógvar ferðir meira har, sigur hon og leggur afturat:

– Tað kann ikki vera rætt, at man skal noyðast at flyta av landinum, tá man hevur útbúgving og fulltíðarstarv. Eg skilji væl, um fólk halda tað vera løgið, at tað ikki ber til at liva sum stakur uppihaldari í Føroyum, uttan at liva av olmussu frá øðrum – og tað siga tey eisini ofta hart ...

*rigmor@sosialurin.fo*

**Fundur um stakar uppihaldarar verður í Miðlahúsinum í kvøld kl. 19.30**




## Kenna seg sum brotsmenn

Inger og Beinta siga seg ofta kenna seg sum forbrydarar. Bæði mótvegis øðrum fólkum og myndugleikunum.

Serliga uppliva tær, at tosingarlagið kann vera bæði særandi og eyðmýkjandi.

– Eg kundi hugsað mær at møtt meira forstáilsi – og ikki at verða móttikin sum ein kriminell, bara tí eg eri stakur uppihaldari, sigur Beinta, sum heldur summi fólk vera rættiliga fordømandi móti einligum foreldrum.

Inger leggur afturat:

– Til dømis, um eg sigi við onkran, at hatta havi eg ikki ráð til. So fær man hatta eygnabráið, sum ferðast niðri frá skónum og upp til hárið, líkasum fyri at siga, hmmm.. tað er væl eisini ein spurningur um raðfesting, tí tú sært ikki út til at mangla nakað. Ella, sum ein segði: Men tú hevur ráð til brúntkrem. Heilt erligt, hvussu lágt kunnu fólk seta seg sjálvi? spyr Inger.

– Og so siga fólk: Tú mást bara spara og raðfesta! Men har er onki at spara ella at raðfesta við, sigur Beinta.

– Og so tosa tey um at hava uppsparingar, flennir Inger.

